# Samskiftið millum liðini betrast

*Beint eftir klokkan seks fekk Alarmsentralurin boð um eina ferðsluvanlukku beint norðan fyri vindmátaran á Kaldbaksvegnum. Tíbetur var hesaferð talan um eina venjing, og fyrireikararnir eru væl nøgdir við »úrslitið«. – Men eg haldi, at samskiftið millum tey, sum eru við eigur at vera bøtt, sigur Hans Dávid Hansen*



Sløkkiliðsmenn í holt við at skera takið av bilinum, fyri at sleppa framat teimum, sum sótu fastkleimd í bilinum

SVEINUR TRÓNDARSON OG JENS KRISTIAN VANG

Stutt eftir klokkan seks mikudagin fekk Alarmsentralurin boð um, at ein heldur enn ikki ógvuslig ferðsluvanlukka var hend skamt frá vindmátaranum á vegnum inn móti Sundi, og lítla løtu eftir, vóru øll, sum skuldu vera við í venjingini, sum tað nú einaferð var, farin til verka.

Tey vistu bara ikki av, at talan var um eina venjing, og tí arbeiddu tey sum talan var um eina veruliga vanlukku, og tað var júst ætlanin.

**Tyrlur, sjúkrabilar, løgregla og sløkkilið**
Tað var ikki eiti á apparat, sum var sett saman í sambandi við venjingina.

Tað eru tey fægstu okkara, sum hugsa um, hvussu nógv skal skipast og samskipast, tá ein vanlukka hendir, men hóast talan var um fleiri ymisk lið, sum skuldu setast í gongd, so gekk tað kortini skjótt fyri seg.

Níggju minuttir eftir, at boðini vóru komin Alarmsentralinum í hendi, var fyrsti bilurin komin á staðið og tað var ein lítið tespilig sjón í bíðaði teimum har.

Ein bilur stóð eftir øðrum kjafti upp móti autoverjuni og í honum sótu trý fólk fastkleimd.

Hin bilurin, sum var við í ferðsluóhappinum, var ikki so heppin, tí hann var farin á bláman og var sokkin.

Men ikki nóg mikið við tað. Ein persónur, sum var við í ferðsluóhappinum var so skelkaður, at hann helt til beins niðan í hagan, har hann seinni rendi seg fastan í eini rás, og haðani slapp hann ikki vekk aftur, uttan við hjálp frá tyrluni.



Sjúkrabilarnir stóðu til reiðar at flyta fólkini á Landssjúkrahúsið ...



»Ferðsluvanlukkan« hendi einar 500 metrar frá vindmátaranum, sum stendur við vegjaðaran á vegnum inn móti Kaldbaksbotni. Eitt pláss við sera nógvari ferðslu ...


DRÚGVUR LEYGARDAGUR
Í MÓTASKÁLANUM
Opið er til kl. 17.00
Páskastásið
til ta ungu kvinnuna

Leygardagin lata vit
÷10%
av øllum jakkum
Vælkomin
inn á gólvið
mótaskálin
Dr. Jacobsensgøta 20
Tórshavn Tlf. 31 53 17
Sosialurin - 311820






*– Venjingin eydnaðist sera væl, sigur Hans Dávid Hanse, sum saman við øðrum hevði fyrireikað venjingina. Fjølmiðlarnir vóru bodnir við fyri at síggja hvussu leikur fer tá arbeitt verður. Og synd er at siga, at tað sær tespiligt út ...*

**Gekk sera væl**
Tá vit hósdagin tosaðu við Hans Dávid Hansen, sum saman við Jógvani Jensen og Jón Klein Olsen hevði reikað fyri venjingini, lat hann væl at.

– Jú, eg haldi, at alt gekk upp á stás. Vit fingu roynt nógv, og tá fleiri av teimum, sum vóru »til arbeiðis« ikki uppdagaðu, at talan var um eina venjing fyrr enn hon var komin væl áleiðis, tá er fyrireikingararbeiðið væleydnað, sigur Hans Dávid.

Hann greiðir frá, at endamálið við venjingini er, at síggja hvussu tey ymsiku liðini arbeiða og samarbeiða og tað vísti seg at ganga sera væl. Venjingin var eftirmett beint eftir at hon var liðug, og sambært Hans Dávidi vóru allir partar sera væl nøgdir við avrikið.

– Tann reyði tráðurin til eftirmetingina var, at venjingin var væleydnað og at »vanlukkan« var sera realistisk, greiðir Hans Dávid frá.

**Samskiftið betrast**
Men hóast venjingin gekk væl, og allir partar vóru nøgdir, so var kortini okkurt at fílast á.

Í hesum føri er tað samskiftið millum liðini, sum Hans Dávid heldur, at strembað eigur at vera fram ímóti verður bøtt.

– Tað er ein trupulleiki, at liðini ikki kunnu tosa saman beinleiðis, og tað eiga vit at arbeiða framímóti, sigur Hans Dávid Hansen.

Hann heldur, at tað í hesum samskiftistíðum, átti at verið møguligt, at funnið eina brúkiliga skipan, sum allir partar kundu fingið gagn av.

– GSM-skipanin er nú her og tað er kanska ein gongd leið, sigur Hans Dávid og leggur dent á, at talan bert er um eitt hugskot.

Hann vísir á, at løgreglan hevði samband við tyrluna um VHF, og tann skipanin virkaði væl.

– Vit á branstøðini royndu fyri fyrstu ferð at hava samband við kavarar okkara, sum fóru niður til bilin, og tað riggaði serstakliga væl. Teir samskiftu eisini sínamillum á sama hátt, og tað er munandi framgongd sammett við, at teir fyrr brúktu tekin og fingramál, so at siga, greiðir Hans Dávid frá.

Men um samskiftisviðurskiftini verða broytt, og í fall, nær, er ikki gott at vita.

Boðini um, at tað hevði verið rætt, at gjørt nakað við júst tann partin av bjargingararbeiðinum, er farin.

Og fyri okkum onnur, sum skulu líta á bjargingarskipaninar, er tað gott at vita, at tað er ein skipan, sum virkar.



*Tyrlan hjá Atlantsflogi sveimar yvir tveimum løgreglumonnum. Uppgávan hjá tyrluni var at fáa ein mann, sum fjálturstungin var rýmdur av staðnum, og sum hevði gingið seg fastan í haganum ...*


TILBOÐ
Antik velour
til dúkar o.s.fr.
fæst í
20 ymiskum litum
150 cm. breitt
BERT
kr. 30,-
pr. m.
Vit hava opið
til kl. 17.00
leygardagin!
Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21 - Tel 315315
Postordrar verða avgreiddir
Sosialurin - 311820